www.sosialurin.fo Leys størv á Sosialinum




# Bókhaldari

**Ein fyritøka í vøkstri krevur eisini vøkstur í umsitingini.**

Tí søkja vit nú eftir fólki at arbeiða í bókhaldi okkara hálva tíð. Framman undan eru trý fólk í starvi í bókahdlinum.

Starvið fevnir um alt vanligt bókhaldsarbeiði, herundir bókingar av inntøkum og útreiðslum, avstemmanir og debetor- og kreditorrøkt.

Vit kunnu bjóða tær eitt avbjóðandi starv í einum spennandi umhvørvi í eini fyritøku, sum er í støðugari menning, og sum í dag virkar á fleiri miðlapallum. Og vit ímynda okkum, at tú ert til reiðar at byrja í nýggja starvinum í seinasta lagi 1. september – men um møguligt gjarna fyri hetta.

Er áhugi at frætta meira um starvið, ber sjálvandi til at ringja til okkara á telefon 341800 og tosa við Jákup Mørk ella Johonnu Vang. Sjálvandi ber eisini til at senda teldubræv til jakup@sosialurin.fo ella til johanna@sosialurin.fo

Umsóknir við viðkomandi upplýsingum eiga í seinasta lagi tann 20. juli at verða sendar til

Sosialurin
Postsmoga 76
FO-110 Tórshavn

*Sosialurin hevur vaksið um virksemi frá at verða eitt tíðindablað, til at verða stórsta fjølmiðlafyritøkan í landinum. Fyritøkan umfatar Sosialin, Rás2, S-lýsingar, Portalurin, Sportal, Planet.fo, Rás1 og Miðlahúsið. Tilsamans starvast í dag umleið 45 starvsfólk í fyritøkuni.*

# Tíðin rennur

## - Nýggj fløga við Stanley Samuelsen

Konsertir:
Vágsbotni, Reinsaríðnum 14. juli kl. 20.00
Fuglafirði, Ribarhus 15. Juli kl. 20.00
Mini G!
Miðvági, Cafekvøld 24. juli
SMS á torginum 26. juli
Miðlahúsinum 28. & 29. juli

www.myspace.com/stanleysamuelsen
www.stanleysamuelsen.dk

Stuðlað hava Sosialurin, Dimmalætting, Sendistovan, Bilrøkt




# Hevur tú eitt miðlafólk í búkinum?

Starvslýsing: Journalistur til Miðlahúsið




Samtakið kring Miðlahúsið fevnir um Sosialin og Miðlavarpið, ið rekur Rás2. Í samtakinum starvast í dag 42 fólk.

Kom og hjálp okkum at menna Rás2, Sosialin og Portalin. Í Miðlahúsinum í Vágsbotni vilja vit støðugt styrkja okkum til avbjóðingarnar í einum livandi fjølmiðlaheimi.

Síðani oktober í fjør hevur Rás2 verið partur av okkara samtaki, sum er í støðugari menning. Nú sóknast vit eftir fólki at styrkja um tíðinda- og aktualitets partin á redaktiónini, fyrst og fremst á Rás2.

Sum partur av Miðlahúsinum fært tú møguleikan at virka í einum livandi og dynamiskum fjølmiðlaumhvørvi, har vit í felag royna at gagnnýta styrkir og møguleikar hjá okkara miðlum. So hevur tú hug til tíðindaheimin? Nøs fyri eini góðari søgu? Hevur tú hug og evni, bæði at arbeiða sjálvstøðugt og tætt saman við øðrum. Og dámar tær avbjóðingar? So lat okkum frætta frá tær!

Útbúgving og/ella royndir innan fjølmiðlaøkið eru absolutt fyrimunir, men tó ikki treytir.

Tú byrjar í starvi hjá okkum skjótast tilber, men helst ikki seinni enn 1. august.

Tú fært meira um starvið við at seta teg í samband við Jan Müller, stjóra, á telefon 341800. Eisini ber til at senda teldubræv til jan@sosialurin.fo

Merkið brævbjálvan »umsókn« og sendið hesa í seinasta lagi 15. juli til:

**P/F Miðlavarpið**
**Postsmoga 76**
**FO-110 Tórshavn**

Sosialurin
miðlahúsið í Vágsbotni